Kunngerðablaðið A

2010 Hefti 15

ISSN 0907-905X

Nr. 62

31. mai. 2010

**Løgtingslóg**
**um**
**Húsalánsgrunn**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**Kapittul 1**
**Endamál**

§ **1.** Endamálið við Húsalánsgrunninum er at veita lán sambært §5.

**Kapittul 2**
**Fyrisiting**

§ **2.** Grunnurin verður fyrisitin av einum stýri við 3 limum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir.
*Stk. 2.* Stýrið skipar seg sjálvt við formanni.
*Stk. 3.* Starvstíðin hjá stýrinum er 4 ár.
*Stk. 4.* Stýrið setir stjóra at hava dagligu umsitingina av grunninum. Stýrið kann eisini leggja dagligu umsitingina til ein annan almennan stovn.
*Stk. 5.* Samsýningin til stýrislimirnar skal góðkennast av landsstýrismanninum.

§ **3.** Stýrið ger starvsskipan fyri virksemi sítt. Uppskotið til starvsskipan skal góðkennast av landsstýrismanninum.

§ **4.** Stjórin teknar grunnin saman við einum stýrislimi. Stýrið kann veita umboðsfulltrú.
*Stk. 2.* Loyvt er ikki stýrislimum, stjórn og starvsfólki grunsins at reka ella taka lut í spekulasjónshandlum.
*Stk. 3.* Veitast kann ikki stýrislimum, stjórn og starvsfólki ella grannskoðara hjá grunninum lán uttan góðkenning landsstýrismansins í hvørjum føri sær.

**Kapittul 3**
**Lánisløg**

§ **5.** Húsalánsgrunnurin kann veita veðskuldarlán til sethús og íbúðir, har endamálið við lánunum er at fíggja endurnýggingar og umbyggingar, soleiðis at orkunýtslan minkar.
*Stk. 2.* Øll lán skulu veðsetast innan fyri 80% av metingarvirðinum við tinglýstum veðbrævi, ognarbrævi, skaðaloysisbrævi o.l. í somu fastogn ella við aðrari samsvarandi trygd.
*Stk. 3.* Áðrenn lán verða veitt, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð reglur og treytir um lánsveiting sambært stk. 1.

§ **6.** Grunnurin kann avskriva áogn, um ein ítøkilig meting av fíggjarligu støðu skuldarans talar fyri hesum. Sama er galdandi fyri áogn hjá Húsalánsgrunninum, Bjálvingarstuðulslánsgrunninum og Íbúðagrunninum sambært løgtingslóg nr. 118 frá 18. juni 1997 um Húsalánsgrunn o.a.

**Kapittul 4**
**Ársroknskapur, grannskoðan og eftirlit**

§ **7.** Roknskaparár Húsalánsgrunsins er álmanakkaárið.
*Stk. 2.* Roknskapur Húsalánsgrunsins verður grann-

skoðaður av løggildum grannskoðara, valdur av stýrinum.

*Stk. 3.* Ársfrásøgnin, sum í minsta lagi skal fevna um eina leiðsluátekning, eina fíggjarstøðu, eitt rakstrarúrslit, notur, undir hesum frágreiðing um, hvør roknskaparmannagongd er fylgd, broytingar í eginognini og frágreiðing frá stýri og stjórn um virksemi í farna árinum, verður send landsstýrismanninum fyri 1. juli á hvørjum ári.

**§ 8.** Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við stovninum. Tryggingareftirlitið útinnir uttanhýsis eftirlitið sambært nærri reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir. Grunnurin hevur skyldu at lata eftirlitinum allar upplýsingar um grunsins viðurskifti, sum eftirlitið ynskir.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann gera avtalu við Tryggingareftirlitið um eftirlit sambært reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir.

## Kapittul 5
## Kærurættur

**§ 9.** Kæra um avgerðir grunsins kunnu verða lagdar fyri landsstýrismannin.

*Stk. 2.* Kærast skal innan fýra vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann taka avgerð um, at heimildin hjá landsstýrismanninum eftir stk. 1 kann leggjast til eina kærunevnd.

## Kapittul 6
## Gildiskoma og skiftisreglur

**§ 10.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2010. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 118 frá 18. juni 1997 um Húsalánsgrunn o.a. Fyri lán, givin sambært løgtingslóg nr. 118 frá 18. juni 1997 um Húsalánsgrunn o.a., verður lógin tó framvegis galdandi.

*Stk. 2.* Grunnurin sambært hesi lóg tekur við allari ogn og skuld og rættindum og skuldbindingum hjá Húsalánsgrunninum, Bjálvingarstuðulslánsgrunninum og Íbúðagrunninum sambært løgtingslóg nr. 118 frá 18. juni 1997 um Húsalánsgrunn o.a.

Tórshavn, 31. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen**
løgmaður

Lm. nr. 37/2009